HOFF STOFF

# Viðareiðisbørn tóku tey kongaligu á bóli

**Viðareiðisbørn í føroyskum klæðum dansaðu føroyskan dans fyri krúnprinsaparinum. Hetta gjørdist stóra løtan undir vitjanini á Viðareiði, og sjálvt teir álvarsomu lívverjarnir blotnaðu í andlitinum**

TEY KONGALIGU
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

**Viðareiði:** Vitjanin hjá krúnprinsaparinum á Viðareiði fyrrapartin mikudagin var hátíðarlig. Alt frá almennu móttøkuni uttan fyri gamla skúlan og til vitjaninar í kirkjuni og í prestagarðinum.

Men tann mest hugtakandi løtan var, tá ið viðareiðisbørn dansaðu føroyskan dans fyri krúnprinsaparinum í túninum uttan fyri gamla skúlan.

Burtur á heiði rungaði við góðari viðareiðisherðing, og dansurin gekk lystiliga, tá ið Mary og Fríðrikur komu úr prestagarðinum og gingu yvir móti gamla skúlanum.



*Børn á Viðareiði dansa føroyskan dans fyri krúnprinsaparinum. Mary og Fríðrikur vóru týðiliga hugtikin av bønunum*
*Mynd: Eyðbjørn Jacobsen*

### Fingu ein málning

Har stóðu tey og lurtaðu eina góða løtu, og løtan var so serliga, at sjálvt teir álvarsomu lívverjarnir fingu eitt smíl upp á eina løtu.

Eftir at børnini vóru liðug at dansa, fekk krúnprinsaparið handað eina gávu frá fólkinum á Viðareiði. Tað var ein stórur málningur eftir lokala listarmannin Arnold Vegghamar.

Málningurin var útsýnið av Viðareiði, sum Mary hevði verið so hugtikin av, tá ið hon kom til bygdina. Sjálvur sigur Arnold Vegghamar um sínar málningar, at teir eru hansara innara landslag.

So hvør veit, um ikki eyðkendi málningurin hjá Vegghamar fær eitt gott pláss á onkrum royalum veggi, tá ið tey koma aftur til Danmarkar.

# Mary fór til stroks

**Krúnprinsesan var so hugtikin av útsýninum á Viðareiði, at hon fór til stroks oman eftir bønum. Krúnprinsurin noyddist at stórleypa aftaná**

TEY KONGALIGU
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Mary fer undan øllum hinum fylginum fyri at hyggja seg um niðri móti bakkanum á Viðareiði. Prisurin roynir sum frægast at fylgja við*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Eftir at krúnprinsaparið hevði heilsað upp á umboðini fyri bygdaráðið á Viðareiði, gingu tey yvir í kirkjuna, har Elsa Funding, prestur, skuldi taka ímóti teimum.

Men á vegnum yvir móti kirkjuni fór Mary krúnprinsessa til stroks oman eftir bønum.Hon var so hugtikin av útsýninum, at hon mátti ganga oman móti bakkanum at hyggja seg um.

Krúnprinsurin kom stórleypandi í hølunum á henni, og borgarstjórin Árni Absalonsen og bygdaráðslimurin Kári Kallsberg fóru eisini við oman móti helluni.

### Hugtikin av útsýninum

– Tey tosaðu um, hvussu vakurt tað var, og eg haldi, at tey vildu vera eina løtu úti. Eg greiddi teimum frá fuglabjørgunum norðanfyri, sigur Kári Kallsberg.

Mary og Fríðrikur stóðu eina løtu nirði móti bakkanum og skimaðist rundan um seg. Útsýnið var stórsligið við teimum høgu fjøllunum í tí góða veðrinum.

Prátið gekk eina løtu millum tey fýra niðri í bønum, og so komu tey niðan aftur og tóku upp aftur almennu skránna.

*Tey koma niðan aftur gjøgnum bønum – Kári Kallsberg, Árni Absalonsen, Mary og Fríðrikur*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

